## Icelandair keypir part av Easyjet

**Bretska sonevnda lágprísflogfelagið, Easyjet, er nú lutvíst á íslendskum hondum**

HANDIL
*www.sparikassin.fo*

Tað er greitt, eftir at Icelandair hevur keypt 8,4 prosent av partabrøvunum í Easyjet, sum er næststørsta lágprísflogfelagið í Europa eftir Ryanair.

The Times, sum hev-ur høvuðsstøð í London, skrivar, at íslendska fyritøkan helst man hava goldið umleið 50 mió. bretsk pund fyri partabrøvini. Tað svarar til umleið 600 mió. kr.

Hannes Smárason, nevndarformaður í Icelandair, er ikki avvísandi mótvegis tankanum um, at íslendska fyritøkan seinni vil ogna sær enn ein bita av Easyjet.

– Vit hava stórt álit á, at handilshátturin hjá Easyjet er rættur, og framtíðarútlitini hjá fyritøkuni eru bjørt, sigur Hannes Smárason.

Seinastu tíðina er Icelandair sett í samband við stórar vakstrarætlanir uttan fyri landoddarnar. Eitt nú skal felagið hava áhuga fyri ungarnska flogfelagnum Malev, ið skal einskiljast. Eisini er nevnt, at Icelandair hevur hug á partabrøvum í føroyska Atlantsflogi.

# Nálaviðgerð í høvuðsstaðnum

**Sum nakað nýtt er ein akupunkturklinikk latin upp í høvuðsstaðnum. Tað er Petra Gardar Neumann, sum er akupunktørur, ið nú bjóðar hesa tænastuna út. Hetta er tann fyrsta klinikkin av sínum slagi í Tórshavn**

HEILSA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Petra Gardar Neumann hevur júst latið eina akupunkturklinikk upp í Tórshavn. Hetta er ein klinikk, sum burturav bjóðar akupunktur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Alternativ viðgerð breiðir seg meira og meira til Føroya. Zoneterapi hevur havt fótin innan fyri í eina rúma tíð, og akupunkturur eisini. Tað hevur tó ikki verið nøkur klinikk, sum burtur av bjóðar akupunktur – inntil nú.

Petra Gardar Neumann, sum er sjúkrarøktarfrøðingur og akupunktørur, hevur júst latið eina klinikk upp í Brøttubrekku í Tórshavn. Petra hevur búð í Danmark í mong ár, men nú er hon flutt heim við familju sínari og fer at bjóða nálaviðgerð í høvuðsstaðnum.

Akupunkturur er ein gamal kinverskur viðgerðarháttur, sum kann hjálpa ímóti alskyns trupulleikum og sjúkum. Bæði akuttum og kroniskum.

Petra sigur, at tað er sera torført at lýsa stutt, hvussu og hvørjum akupunkturur kann hjálpa ímóti, og tískil hevur hon gjørt ein faldara, har upplýsingarnir um viðgerð og annað kunnu fáast.

### Viðgerðin

Akupunkturviðgerð hevur ongi hjáárin, men tað er ikki óvanligt, at kroppurin reagerar eftir viðgerð. Ein kann vera troyttur, vera svimbul ella hava eina prikandi ella surrandi kenslu.

– Júst hvussu nógvar viðgerðir, tað krevur fyri at fáa hjálp, er ilt at meta um, sigur Petra. Men tað veldst alt um, hvør sjúkan er, og hvussu umfatandi hon er. Petra greiðir frá, at akuttar støður krevja færri viðgerðir enn kroniskar. Men sum heild plagar hon at mæla til at steðga viðgerðini, um ongin bati er at hóma eftir tríggjar ella fýra viðgerðir.

Ein akupunkturviðgerð tekur umleið 20 minuttir, men tann fyrsta viðgerðin tekur nakað longri tíð, tí fyri at staðfesta eina diagnosu, skal ein samrøða við sjúklingin til.

Hvussu viðgerðin virkar er eisini ójavnt. Summar akuttar støður hvørva heilt, og tað kemur eisini fyri, at kroniskar hvørva. Men tað er rættiliga vanligt, at kroniskar støður krevja viðgerð javnan. Men tað kann skifta frá einaferð um vikuna, mánaðin, ársfjórðingin, hálvárið ja til enntá bara einaferð um árið, greiðir Petra frá.

### Alskyns sjúkur

Akupunkturur kann hjálpa ímóti einum ótali av sjúkum ella trupulleikum. Sum dømi kunnu nevnast: Allar pínur, millum annað migrenu og høvuðpínu, giktsjúkum, menustratiónspínu/trupulleikum, høgum blóðtrýsti, immunsjúku, øllum sløgum av ítróttarskaðum og kválma, herundir hjá-árin frá kemoviðgerð.

Eisini hevur akupunkturur víst seg at rigga væl sum viðgerð til royki avvenjing og vekttap.

Petra kemur at arbeiða sum akupunktørur einsamøll í sínari klinikk, og hon er rættiliga spent uppá, hvussu undirtøkan verður. Hon hevur havt nøkur vitjandi longu, hóast hon ikki rættiliga er komin í gongd enn. Hvat grundarlagið er fyri slíkari viðgerð í Føroyum, er ikki lætt at siga nakað um, men Petra metir, at tað man vera nakað tað sama, sum í øðrum londum.

Petra fer at arbeiða frá klokkan 10 til 14 mánadag til fríggjadag – tó mikudag frá klokkan 14 til 18. Klinikkin heldur til í Brøttubrekku 9 og hevur tlf. 273412.

**FAKTA**

*Petra Gardar Neumann tók sína útbúgving sum akupunktørur á einum akupunkturskúla í Roskilde. Útbúgvingin tók knapt tvey ár, har hon millum annað arbeiddi ein dag saman við ein kinverskum professara. Útbúgvingin er góðkend hjá praktiserandi akupunktørum í Danmark.*

## Gunnar á Jacques

**Leygarkvøldið fer vinnarin av Stjerne for en aften, Gunnar Mikkelsen, at undirhalda í Keypmannahavn**



Nú fáa føroyingar í Keypmannahavn høvi at hoyra Gunnar Mikkelsen syngja og spæla. Gunnar, ið hevur føroyska mammu, fer at spæla solo akkustiskt un-plugged, sum tað nevnist. Umframt cover-løg fer hann at spæla egin løg av fløguni, ið varð útgivin fyrr í ár.

Dyrnar lata upp klokkan 22, og konsertin byrjar klokkan 23.

# Loksins kom www.klaksvik.fo

**Týsmorgunin klokkan 10 almannakunngjørdi Klaksvíkar kommuna sína heimasíðu. Arbeiðið upp á heimasíðuna hevur tikið langa tíð, men seinasta hálva árið hevur verið arbeitt miðvíst við henni, og úrslitið er ein flott heimasíða við nógvum upplýsingum**

HEIMASÍÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Týsmorgunin klokkan 10 kundi Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, leggja nýggju heimasíðuna hjá Klaksvíkar kommunu út á netið.*

*– Hetta er ein stórur dagur fyri okkum, segði hann*

**Klaksvík:**
Heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu hevur verið í gerð í langa tíð. Alt hetta valskeiðið hevur verið arbeitt við henni, men tó ikki miðvíst fyrr enn tað seinasta hálva árið. Ein bólkur frá umsitingini hjá kommununi hevur arbeitt við heimasíðuni saman við Pf Zenit, sum hevur gjørt skipanina.

John Færø, býráðsskrivari, viðgekk týsmorgunin, at arbeiðið hevur tikið alt ov langa tíð, men var hann sum vera man sera fegin og errin av, at tað nú endiliga finst ein heimasíða fyri Klaksvíkar kommunu.

– Tað er onki dulsmál, at øll hava bíðað longi eftir hesari heimasíðuni. Men vit hava so valt at gera hana góða og rættiliga gjøgnumførda heldur enn at skunda eina lappaloysn ígjøgnum bara fyri at hava eina heimasíðu at vísa á, segði hann millum annað.

Ein heimasíðan skal dagførast javnan, og verður ein persónur settur til at taka sær av henni.

### Økt tænastustøðið

Tað er sum sagt Pf Zenit í Tórshavn, sum hevur gjørt heimasíðuskipanina hjá Klaksvíkar kommunu.

John Færø greiðir frá, at kommunan bjóðaði arbeiðið út tann tíð tað var, og hevði Zenit tað lægsta tilboðið í tí klassanum, sum kommunan ynskti.

Ætlanin hjá kommununi er eisini, at fólk skulu kunna tekna seg til ein teldupostlista á heimasíðuni, so at tey fáa ein teldupost hvørja ferð okkurt nýtt verður lagt út.

John heldur fram, at við heimasíðuni er tænastustøðið økt munandi, tí nú fáa fólk nógv skjótari atgongd til upplýsingar, sum teimum møguliga tørvar.

Til dømis verða allar býráðsfundarskráir lagdar út og samtyktirnar eisini.

Á síðuni eru alskyns upplýsingar um bæði eitt og annað í býnum og kommununi. Mikladalur er eisini at finna á síðuni, eftirsum at kommunurnar leggja saman frá 1. januar. Tað er tó alt ov umfatandi at fara at nevna alt her, men ein kann bara klikkja seg inn á www.klaksvik.fo, har ein sjálvur kann hygga seg um.



Hans Pauli Strøm:

# Eg gjørdi eitt mistak

**Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, viðgongur, at hann gjørdi eitt mistak, tá ið hann viðgjørdi málið um umstrídda leiðaran á fríðarskúlanum á Tvøroyri. Men rættartrygdin er ikki brotin, sigur hann**

FRÍTÍÐARSKÚLIN Á TVØROYRI
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Atfinningarnar heglaðu niðuryvir Hans Paula Strøm í tinginum mikudagin, men sjálvur vil hann bara viðganga eitt mistak*

– Tað hevði fingið ov stórar avleiðingar fyri tvørafólk at stongt frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Tað heldur landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm.

Frítíðarskúlin á Tvøroyri hevur verið eitt heitt politiskt epli seinastu tíðina.

Og mikudagin varð málið fyri í sjálvum løgtinginum.

Har hevði Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna, sett Hans Paula Strøm nakrar atfinningarsamar spurningar um frítíðarskúlan.

Løgtingskvinnan vildi hava at vita um tað er í samsvari við lógina um dagstovnar og dagrøkt, at ein lærari er settur til leiðara í frítíðarskúlanum á Tvøroyri.

Og um tað ikki er í lagi, hví hevur so landsstýrismaðurin góðtikið mannagongdina?

Annita vildi eisini hava at vita um landsstýrismaðurin hevur lovað Tvøroyrar kommunu at arbeiða fyri, at lógin verður broytt soleiðis, at tað, sum er farið fram á Tvøroyri, frameftir verður lógligt.

Og at enda vildi hon hava at vita, hví landsstýrismaðurin broytti áskoðan, tí fyrst hótti hann við at steingja frítíðarskúlan, men síðani góðtók hann at pedagogurin varð vrakaður.

Hans Pauli Strøm svaraði, at leiðarin á einum dagstovni skal hava námsfrøðiliga útbúgving og í hesum føri merkir tað pedagogur.

Men í serligum førum kann undantak gerast í eitt avmarkað tíðarskeið. Eitt nú kann tað koma fyri í eini lítlari kommunu, tá ið ongin við námsfrøðiligari útbúgving søkir eitt leiðandi starv í einum dagstovni ella eini dagrøkt.

Starvið, sum talan er um, er at avloysarastarv fyri tann setta leiðaran, sum er í farloyvi og byrjar aftur næsta summar.

– Sum kunnugt søkti ein námsfrøðingur starvið. Men at ein umsøkjari hevur námsfrøðiliga útbúgving, er í sær sjálvum ikki nokk til, at viðkomandi hevur rætt til at fáa starvið, hóast hann er einasti umsøkjarin við røttu útbúgvingini, sigur Hans Pauli Strøm.

### Skuldu lýst starvið leyst

Hann sigur, at Tvøroyrar kommuna hevur grundgivið fyri pedagoginum, hví hann ikki fekk starvið.

Men hann heldur ikki, at almanna- og heilsumálaráðið er ført fyri at meta um materiella innihaldið í grundgevingini, betur enn kommunan er.

Kommunan er setanarmyndugleiki, og lýkur hon annars formligu krøvini, má vera rúm fyri eini meting hjá kommununi, sigur Hans Pauli Strøm.

Kortini heldur hann, at í hesum føri átti kommunan helst at lýst starvið leyst av nýggjum fyri at vita um ikki onkur skikkaður námsfrøðingur søkti starvið.

– Tað hevur kommunan eisini fingið at vita frá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Hans Pauli Strøm sigur, at av tí at talan er um eitt avloysarastarv, og at setti leiðarin kemur aftur í summar, vildi hann ikki lata skúlan aftur, sum hann hevur heimild til.

– Eg haldi ikki, at tað hevði fingið slíkar avleiðingar fyri borgaran at frítíðarskúlin varð stongdur, at tað stendur ikki mát við tað, at kommunan ikki til fullnar lýkur teytina fyri at geva undantak.

Annars avsannar landsstýrismaðurin, at hann hevur lovað Tvøroyrar Kommunu nakað sum helst. Men hann hevur kunnað kommuna um, at Almanna- og heilsumálaráðið var í ferð við at dagføra dagstovnalógina á fleiri økjum.

Í tí sambandi er ætlanin at broyta førleikakrøvini til leiðarar fyri frítíðarskúlar, soleiðis at umsøkjarar við aðrari námsfrøðiligari útbúgving enn pedagog-útbúgving, kunnu røkja hetta starv, tí frítíðarskúlar eru til børn í skúlaaldri.

### Gjørdi eitt mistak

Annars brúkti helt andstøðan í tinginum seg ikki aftur og heglaði lands-stýrismannin ígjøgnum fyri hansara embætisførslu í hesum málið.

Tinglmir settu spurnartekin við rættartrygdina, men tað vildi landsstýrismaðurin ikki góðtaka.

Hann segði at embætisfólk í Almanna- og heilsumálaráðnum hava viðgjørt málið í dagar, eisini saman við Innlendismálaráðnum og niðurstøðan er, at rættartrygdin er ikki brotin.

Tinglimir hildu eisini, at hann pedagogurin varð settur til viks av ósakligum orsøkum.

Eitt nú skuldi orsøkin vera okkurt, hon hevði sagt í einum foreldrafundi í eini stovu í barnagarðinum fyri einum ári síðani.

Landsstýrismaðurin vildi heldur ikki vita av, at talan var um ósakligar orsøkir, men hann vildi ikki nevna tær ítøkiligu orsøkirnar, tí talan var um persónsmál, sum hann ikki hevði heimild at almannakunngera fyri løgtinginum.

Men í einum føri viðgekk hann, at hann gjørdi eitt mistak.

Tað var harðliga funnist at Hans Paula Strøm tí at hann var farin á fund við Tvøroyrar Býráð, uttan at hava embætisfólk við og átti ikki at koma fyri hjá einum landsstýrismanni.

Og nú Hans Pauli Strøm hugdi í bakspegilin, og sá, hvussu stóra umrøðu málið fekk, kundi hann viðganga, at tað var eitt mistak.

Men orsøkin var, at embætisfólkini, sum skuldu við, fingu forfall og hann helt ikki, atr málið hevði slíkan týdning, at tað var neyðugt at avlýsa.

Og tað vóru eisini fleiri andstøðutinglimir, sum hildu, at hetta áttu at fáa avleiðingar.

Tað var ikki hildið at vera ráðiligt at leggja uppskot um misálit fyri tingið tí við so stórari samgongu, fór tað aldrin at vera samtykt.

Men at enda heitti Páll á Reynatúgvu so á formannin í Landsstýrismálanevndini um at taka málið upp.

(Sí eisini grein aðrastaðni í blaðnum).

## Norrønur umsitarafundur í Føroyum

**Tey, ið umsita áhugasjónleik í norðanlondum, hittast hósdagin til fund í Føroyum**

ÁHUGASJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

NAR - Nordisk Amatørteaterråd - er samstarvsfelagsskapur av áhugasjónleikarafeløgunum í Finnlandi, Álandi, Svøríki, Noregi, Danmørk, Føroyum, Íslandi og Grønlandi. NAR verður stuðlað av Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Í nevndini í NAR eru í løtuni: Carita Välitalo, Finnlandi, Maria Mäntylä, Álandi, Hilding Lindbäck, Svøríki, Steinar Arnesen, Noregi, Line Hauger, Danmark, Hilmar Joensen, Føroyum, og Einar Rafn Haraldsson, Íslandi. Steinar Arnesen er formaður. Skrivstovan hjá NAR er í Finnlandi, og hevur Carola Selenius hana um hendi.

NAR hevur regluligar fundir tvær ferðir um árið, men umsitararnir, ið manna skrivstovurnar í teim ymsu lond-unum, hittast á fundi annaðhvørt ár at viðgera felagsmálini. Í ár verður hesin fundurin í Før-oyum 29. og 30. oktober.

Norðurlendsku gestirnir koma til Føroya hósdagin 28. oktober. Hóskvøldið verður spákingartúrur í gamla býarpartinum í Havn. Fríggjadagin 29. oktober verður fundur frá kl.10 til 14. Tá verður farið útferð til Gøtu at síggja Blásastovu, Gøtu kirkju og Töting. Úr Gøtu verður farið til Klaksvíkar, har Klaksvíkar Sjónleikarafelag í Atlantis frumsýnir franska skemtileikin »Ansa mær eftir Amaliu« eftir Georges Feydaue.

Leygardagin 30. oktober verður fundur frá kl. 10. Tórshavnar Býráð er vertur kl. 13. Síðan verður fundur aftur til kl.15. Seinni um dagin vitja gestirnir í Norðurlandahúsinum og í Listaskálanum.

Kl. 19 leygarkvøldið er frumsýning á Meiarínum. Tað er Leikhúsið Gríma, ið sýnir norska leikin »Elling og Kjell Bjarne« eftir Axel Hellstenius eftir skaldsøgu hjá Ingvar Ambjørnsen.

Í nevndini í MáF (Meginfelag áhugaleikara Føroya) eru: Hilmar Joensen, formaður, Sólvá Jónsdóttir, næstformaður, Jógvan Ravnsfjall, kassameistari, Eyð Matras, skrivari, og Heðin Mortensen, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Hjørdis Johansen og Aksel Joensen.

Umsitingarleiðari í MáF er Malan Matras Joensen. Birita Mohr er listarligur ráðgevi.